Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	19-01-2024
Mál nr.:	24/01720
Málsviðgjørt:	HW
Ummælistíð:	Frá 19. januar til 5. februar
Eftirkannað:	19. februar 2024

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan
(Ásetingar um næmingatal í hvørjum flokki)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022, verður § 20 orðað soleiðis:

"**§ 20.** Er næmingatalið í flokkinum hægri enn 20 við skúlaársbyrjan, kann skúlaleiðarin avgera at býta flokkin í tveir flokkar ella seta aðra fyriskipan í verk, undir hesum tvílæraraskipan o.a. Hetta verður galdandi frá skúlaárinum 2025-26, tá byrjað verður við 1. flokki og síðani endaliga sett í gildi eftir nýggju árum."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2025.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Í 2023 varð álit handað landsstýrismanninum um broytingar í fólkaskúlalógini, umframt at úrslit frá einari trivnaðarkanning vóru almannakunngjørd.

Í álitinum sæst m.a., hvussu stóran týdning tað hevur, at vit hava eina skipan, sum tekur nøktandi atlit at støddini á tí einstaka flokkinum, soleiðis at henda sampakkar við nøktandi tíð til tann einstaka næmingin. Mælt verður m.a. til í álitinum, at næmingatalið ikki fer uppum 20 næmingar.

Trivnaðarkanningin, sum var almannakunngjørd, vísti tíverri, at trivnaðurin millum børnini í føroyska fólkaskúlanum ikki er vorðin betri, men heldur hevur gongdin verið hinvegin, t.e. at trivnaðurin er versnaður. Hvat trivnaði viðvíkur, eru tað óivað nógvir faktorar sum spæla inn, men tó má ásannast, at nøktandi tíð frá tí vaksna til tann einstaka næmingin eisini kann vera við til betran av trivnaðinum.

Við at seta inn og geva møguleika fyri at minka um floksstøddina, verður fyrsta stig tikið til at tryggja tí einstaka næminginum betri úrtøku frá tíðini í fólkaskúlanum, og væntandi kemur hetta átak eisini at betra um trivnaðin hjá børnunum.

Ætlanin er eisini í komandi ári at gera aðrar broytingar, sum kunnu stuðla upp undir betri trivnaði hjá bæði børnum og teim vaksnu, sum hava sítt yrki innan skúlagátt, umframt at betra úrtøkuna hjá tí einstaka næminginum. Hetta væntast at vera gjørt við eitt nú at hyggja nærri at flokslæraraskipanini, longdini á skúladegnum, tíma- og lærugreinabýtinum og møguleikanum fyri at víðka um núverandi tvílæraraskipan, ið nú fevnir um 1. og 2. flokk, til eisini at fevna um 3. flokk.

Við støði í omanfyri standandi snýr henda broyting seg einans um at minka floksstøddina frá 24 næmingum í hvørjum flokki niður á 20 næmingar, men er hetta bert fyrsta stig á leiðini móti einum enn betri fólkaskúla.

1.2. Galdandi lóggáva
Í galdandi lóggávu stendur, at við skúlaársbyrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokkinum. Henda orðing er heldur ógreið, og í royndum hevur hetta merkt, at flokkar eru og hava verið við upp til 26 næmingum, og at flokkar hava verið býttir í tvey við næmingi nr. 27.

Nógv eru samd um, at tað er ov nógv við upp til 26 næmingum í hvørjum flokki, har tað er trupult hjá læraranum at røkka øllum 26 næmingunum.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Høvuðsendamálið er, at meira læraratíð verður til hvønn einstakan næming. Tískil skal tað vera møguligt hjá hvørjum einstøkum skúla at býta upp í tveir flokkar við næmingi nr. 21. Við at lækka floksstøddina úr 24 næmingum til 20 næmingar, fær hvør næmingur meira tíð saman við sínum lærara, og væntað verður, at henda broyting fer at økja um trivnaðin í hvørjum flokki og at økja um læruúrtøkuna hjá hvørjum einstøkum næmingi og í flokkinum sum heild. Í álitinum við tilmælum um broytingar í fólkaskúlalógini verður við støði í gransking víst á, at floksstødd hevur týdning fyri trivnaðin og úrtøkuna hjá næmingunum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Í galdandi lóg stendur í § 20: "*Við skúlaárs byrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokkinum*". Hetta broytingaruppskotið hevur við sær eina nýskipan, har einstaki skúlin fær rætt til at býta upp í tveir flokkar við næmingi nr. 21. Tað er einstaki skúlin, sum sjálvur hevur ræði til at gera av, um floksbýtið verður gjørt við 21. næminginum, ella um sett verður inn við øðrum fyriskipanum, harundir t.d. við tvílæraraskipan. Sostatt verður tað 21. næmingurin, ið elvir til játtan til nýggjan flokk, og kostnaðurin fyri hetta verður árliga umleið 4 mió. kr.

Henda skipan verður galdandi frá skúlaárinum 2025/2026. Tá verður byrjað við 1. flokki, og skipanin verður síðan rullað út yvir 9 ár og soleiðis sett endaligt í gildi eftir nýggju árum við einum kostnaði á umleið 36 mió. kr. árliga. Sostatt verður henda nýggja skipan við 20 næmingum í flokkunum sett í verk í stigum, soleiðis at tað ganga níggju ár til fult flokkabýtið verður fullført. Í skúlaárinum 2025/2026 eru tað landsins 1. flokkar við fleiri enn 20 næmingum, sum kunnu býtast upp, skúlaárið 2026/2027 verða tað 2. flokkarnir, skúlaárið 2027/2028 3. flokkarnir o.s.fr. heilt fram til skúlaárið 2033/2034, tá 9. flokkarnir kring landið við fleiri enn 20 næmingum kunnu býtast í tveir flokkar.

Tað er bert, um næmingatalið er hægri enn 20 við skúlaársbyrjan, at skúlaleiðarin kann býta flokkin í tvey, tvs. er næmingatalið við skúlaársbyrjan 20 næmingar, har tað so seinni í skúlaárinum koma fleiri næmingar í flokkin, so kann skúlaleiðarin tað skúlaárið ikki býta flokkin í tvey. Men eru fleiri enn 20 næmingar í flokkinum við skúlaársbyrjan, so fær skúlaleiðarin játtan til tveir flokkar, og skúlaleiðarin kann tá velja at býta flokkin í tvey við skúlaársbyrjan ella seinni í skúlaárinum, og skúlaleiðarin kann taka sína avgerð við støði í, hvat er best gagnligt fyri flokkin og fyri skúlan sum heild.

Henda broyting verður gjørd stigvíst grundað á, at kommunurnar og onnur skulu hava tíð til at tillaga hølisumstøðurnar í einstøku skúlunum. Sambært álitinum eru tað í verandi skipan, við í mesta lagi 26 næmingum í hvørjum flokki, í alt 245 flokkar. Tá tað frameftir skulu kunna vera í mesta lagi 20 næmingar í hvørjum flokki frá 1.-9. flokk, so økist flokkatalið við 75 flokkum. Hetta økta flokkatalið er ein vegleiðing hjá kommununum at meta seg eftir í sambandi við hølisviðurskiftini í skúlunum, bæði tá ið talan er um verandi skúlabygningar og nýggja skúlabygging, umframt í sambandi við um- og uppíbygging í verandi skúlum.

Arbeiðsbólkur hevur handað álit um broytingar í fólkaskúlalógini, har eitt av tilmælunum er, at floksstøddin við skúlaársbyrjan eigur at vers 20 næmingar. Tískil má tað frameftir verða játtað til tveir flokkar, tá ið næmingatalið við skúlaársbyrjan er hægri enn 20 næmingar.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Undirvísingarstýrinum, Námi, Sernámi, Námsvísindadeildini, Føroya Lærarafelag, Skúlaleiðarafelagnum, Føroya Pedagogfelag Kommunufelagnum, Gigni, Megd, og Foreldrafelagnum Heim og Skúli, umframt hjá aðalráðunum.

Ummæli er komið frá Undirvísingarstýrinum, Sernámi, Námsvísindadeildini, Føroya Lærarafelag, Kommunufelagnum, Foreldrafelagnum Heim og skúli, Heilsumálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum.

Umhvørvismálaráðið og Almanna- og mentamálaráðið hava boðað frá, at tey ongar viðmerkingar hava til uppskotið.

Einki ummælið er móttikið frá Námi, Gigni, Megd, Skúlaleiðarafelagnum, Føroya Pedagogfelag, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum og Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

Heilsumálaráðið metir ikki, at lógaruppskotið hevur serligar avleiðingar fyri heilsuøkið og hevur ikki aðrar viðmerkingar.

Fíggjarmálaráðið hevur bert viðmerkingar til fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum. Her vísir Fíggjarmálaráðið á, at kostnaðurin fylgir skúlaárinum, og at kostnaðurin í 2025 tískil verður smáar 2 mió. kr. og veksur síðani við 4 mió. kr. árliga, inntil komið verður upp á smáar 34 mió. kr. í 2033. Og at hækkingin í 2034 verður góðar 2 mió. kr., soleiðis at samlaði hægri kostnaðurin verður 36 mió. kr. árliga. Fíggjarmálaráðið staðfestir í sínum hoyringarsvari, at fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum ikki eru við í kendum játtanarframskrivingum, og tískil koma at økja um rakstrarútreiðslur landsins frameftir.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at lógaruppskotið nú er tillagað í samsvari við viðmerkingarnar frá Fíggjarmálaráðnum.

Námsvísindadeildin á Fróðskaparsetri Føroya hevur umrøtt uppskotið vegna Fróðskaparsetrið, og tey siga seg taka fult undir við lógaruppskotinum.

Sernám metir, at hetta uppskotið er ein gongd leið og at gleðast um, men at hetta eigur at vera fyrsta stig á leiðini at styrkja fólkaskúlan. Sernám mælir somuleiðis til at hugsa inn fleiri tímar til flokslæraraleiklutin og til førleikamenning til at styrkja samstarvsarbeiði í skúlanum. Sernám vónar, at tað verður hildið fast við, at møguleikin at minka um floksstøddina verður ein møguleiki hjá skúlanum og ikki eitt krav, tí tað kunnu gerast ógvuliga sárbærir barnabólkar við at hava 10 næmingar í einum flokki og 11 í hinum.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at onnur stig til tess at styrkja fólkaskúlan verða umrøtt í sambandi við komandi broytingar í fólkaskúlalógini.
Ætlanin er at halda fast við, at tað verður ein møguleiki og ikki eitt krav, at skúlin kann býta flokkin í tvey við næmingi nr. 21.

Foreldrafelagið Heim og Skúli stuðlar uppskotinum við tí grundgeving, at hetta er neyðugt til tess at bøta um trivnaðin og læriumhvørvið hjá næmingunum, tí her fær lærarin meira tíð til hvønn einstakan næming. Heim og Skúli hevur yvirskipað ta áskoðan, at námsfrøðingar í fólkaskúlanum gera best gagn í grunddeildini (0-3 flokk), og at eldru flokkarnir hava meira gleði av útbúnum lærarum.
Heim og Skúli metir, at flokkar við færri næmingum fer at minka um tørvin á longri skúladegi, og at tað eisini er neyðugt at stytta skúladagin serliga í eldru flokkunum, har næmingarnir í dag hava upp til 39 undirvísingartímar um vikuna.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at longdin á skúladegnum, tímatalið og tíma- og lærugreinabýtið verða umrødd í sambandi við komandi broytingar í fólkaskúlalógini.

Føroya Lærarafelag tekur undir við eini lógaráseting um, at tað í mesta lagi kunnu verða 20 næmingar í hvørjum flokki, men mælir staðiliga frá orðingini í uppskotinum um, at skúlaleiðarin skal kunna avgera at býta flokkin í tveir flokkar ella seta aðra fyriskipan í verk, tí skúlaleiðarin kann ikki gera hetta uttan at hava neyðugu játtanina frá ráðandi myndugleikanum. Føroya Lærarafelag mælir í staðin til, at henda lógarbroyting heldur verður orðað soleiðis: “Við skúlaársbyrjan eigur næmingatalið ikki at fara upp um 20 í hvørjum flokki”.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at tað í lógaruppskotinum verður hildið fast við verandi orðing, og at neyðuga játtanin fylgir við.

Føroya Lærarafelag hevur í sambandi við orðingina í lógaruppskotinum um at seta aðra fyriskipan í verk viðmerkt, at tað við hesum skal merkja, at sett verður inn við víðkaðari tvílæraraskipan. Føroya Lærarafelag tekur við hesum ikki undir við orðingini í viðmerkingunum til lógaruppskotið um, at skúlaleiðarin við aðrari fyriskipan eitt nú kann seta námsfrøðing inn í flokkin, og lærarafelagið er av tí fatan, at hetta stríðir ímóti § 35, stk. 1 í fólkaskúlalógini, sum m.a. sigur, at fyri at kunna røkja undirvísingina í fólkaskúlanum skal viðkomandi hava lokið útbúgvingina sum fólkaskúlalærari. Føroya Lærarafelag vísir í hesum sambandi eisini til § 14 í kunngerðini um serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligan stuðul, og felagið vil við hesum vera við, at námsfrøðingar kunnu bert setast í starv í fólkaskúlanum til at veita næmingunum sernámsfrøðiligan stuðul og við hesum ikki til undirvísing og ikki sum fyriskipan grundað á næmingatalið.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at hildið verður fast við verandi orðing í lógaruppskotinum, soleiðis at orðingin um at seta aðra fyriskipan í verk fevnir breiðari enn bert víðkaða tvílæraraskipan. Ein námsfrøðingur kann t.d. eisini setast inn í flokkin til at arbeiða við trivnaði í flokkinum og hava til uppgávu at venja næmingar í virkisháttum og arbeiðsháttum til tess at menna virkisførið hjá einstaka næminginum, umframt at veita persónligan og praktiskan stuðul, sum kann hjálpa næminginum í sambandi við skúlagongdina.

Kommunufelagið átalar, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið ikki hevur samskift nærri við Kommunufelagið, áðrenn hetta lógaruppskotið varð sent til almenna hoyring, og at uppskotið var sent felagnum við styttari freist.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at løgfrøðingur í starvi hjá Kommunufelagnum var við í arbeiðsbólkinum, sum hevur skrivað álitið við tilmæli um, at § 20 í fólkaskúlalógini verður broytt, soleiðis at floksstøddin við skúlaársbyrjan verður í samsvari við námsfrøðiliga gransking, har 20 næmingar í flokkunum er best hóskandi fortreyt fyri námsfrøðiliga, trivnaðarliga og fakliga menning. Ráðið harmast um, at lógaruppskotið varð sent út við styttari freist.

Kommunufelagið ivast stórliga í, um tørvur er á lógarbroyting til tess at fáa fleiri vaksin at vera um skúlabørnini, tí talan er um eina rakstrarjáttan og ikki eina lógarbundna játtan.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at tað er umráðandi at fáa staðfest og tryggja við lóg, at okkara næmingar í fólkaskúlum ikki eru í ov stórum flokkum, og at nokk av vaksnum eru um skúlabørnini.

Kommunufelagið vil verða við, at ósamsvar er millum lógartekstin, sum kann tulkast soleiðis, at nýggja floksstøddin verður sett í verk beinanvegin í øllum árgangum, meðan endamálið sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið er at seta í verk markið á 20 næmingar yvir 9 ár.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður staðfest, at lógarbroytingin eftir ætlan skal setast í verk yvir 9 fylgjandi ár.

Kommunufelagið førir fram**,** at tað kann gera meira skaða enn gagn, at skúlaleiðari fær heimild at býta flokkar á t.d. 21 næmingar upp í 10 og 11 næmingar. Kommunufelagið mælir til at varðveita markið fyri floksstødd á 24-26 næmingar, og at tað ikki eigur at vera loyvt skúlaleiðslum, uttan heilt serligar orsakir, at býta flokkar sundur, sum er minni enn hetta.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at tað við broytingaruppskotinum ikki verður álagt skúlaleiðsluni at býta flokk sundur við næmingi nr. 21, men at leiðslurætturin, frælsi og heimildin verður løgd til skúlaleiðsluna at býta flokkin sundur ella seta inn við aðrari fyriskipan. Mett verður, at skúlaleiðslan er best skikkað til at taka slíka avgerð við støði í umstøðunum í flokkinum og skúlanum sum heild.

Kommunufelagið hevur við støði í nógv økta talinum av børnum undir skúlaldur viðmerkt, at næmingatalið í fólkaskúlanum fer at vaksa nógv komandi árini, og at uppskotið ikki tekur hædd fyri og er í samsvari við komandi stóru árgangunum í fólkaskúlanum. Somuleiðis vísir felagið á, at nógvar kommunur seinastu árini hava gjørt ovurstórar íløgur í skúlabygging, at tað tekur tíð at byggja nýggjar skúlar, og at tað verður sera avbjóðandi hjá kommununum frameftir at gera so nógvar og stórar íløgur, sum skulu nøkta hølistørvin í samsvari við hetta lógaruppskotið.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at fólkaskúlin er grundarsteinurin undir okkara útbúgvingarskipan, ið er altavgerandi fyri okkara framtíðar støðu sum eitt framkomið vitanarsamfelag, tí er tað sera umráðandi at fremja tær neyðugu íløgurnar í okkara fólkaskúla. Ein av høvuðsorsøkunum til, at lógaruppskotið ikki skal setast í verk alt fyri eitt, men í staðin yvir 9 ár, er júst fyri at tryggja, at kommunurnar fáa tíð til at tillaga hølisumstøðurnar o.l.

Undirvísingarstýrið hevur viðmerkt**,** at hetta uppskotið eigur at geva øllum pørtum betri fortreytir at náa settum málum og skapa trivnað, og stýrið tekur undir við broytingini at lækka hámarkið fyri floksstøddina niður í 20 næmingar. Undirvísingarstýrið mælir eisini til, at tað eisini eigur at verða umhugsað at áseta eitt niðara mark m.a. vísandi til, at nærum helmingurin av øllum skúlunum hava flokkar við 10 næmingum ella færri.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at tað í hesi lógarbroyting ikki verður ásett eitt niðara mark fyri floksstødd, og at tað ikki er lætt at áseta eitt niðara mark fyri floksstødd, tá vit í okkara skúlaskipan hava lutfalsliga nógvar smáar skúlar við smáum flokkum.

Undirvísingarstýrið metir ikki, at játtanarskipanin eigur at verða umrødd ella skipað beinleiðis í lógini um fólkaskúlan, tí tað ikki er skynsamt bert at broyta ein brotpart av játtanarskipanini við lóg, tí játtanarskipanin higartil ikki hevur verið lógarregulerað og heldur ikki verður mett at hoyra heima í einari lóg. Harumframt er tað ikki skynsamt og gerst ov stirvið, um lógin skal broytast hvørja ferð ynski er um at gera smávegis broytingar í játtanarskipanini. Tískil mælir Undirvísingarstýrið til, at allar orðingar í viðmerkingunum til lógaruppskotið, ið broyta verandi játtanarskipan, verða strikaðar.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at ráðið tekur hesar viðmerkingar til eftirtektar og tillagar uppskotið samsvarandi.

Undirvísingarstýrið vísir á, at játtanarskipanin eigur at verða endurskoðað, soleiðis at játtanin ár undan ári gerst tryggari hjá allari skúlaskipanini. Mælt verður til at vera víðskygd í hesum arbeiðinum og viðgera m.a., um játtanin eigur at vera fyri hvønn næming, í staðin fyri sum nú grundað á flokkatal. Harumframt mælir Undirvísingarstýrið til at viðgera m.a. skipan av størri skúlaeindum, at skipa skúlaøki tvørturum kommunur og at endurskoða aðrar tættir í verandi lóg og játtanarskipan, so sum tímatal í hvørjum árgangi, tíma- og lærugreinabýti, tvílæraraskipan, førleikastovu, miðfirraða serundirvísing v.m.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at onnur stig til tess at styrkja fólkaskúlan verða umrødd í sambandi við næstkomandi broytingar í fólkaskúlalógini. Undir hesum fjølbroyttir arbeiðshættir, tíma- og lærugreinabýti og tímatali í hvørjum árgangi v.m.

Undirvísingarstýrið viðmerkir, at tað við hesi lógarbroyting helst verða fleiri flokkar og skúlar, ið koma at svinga millum 20 og 21 næmingar, enn í dag millum 26 og 27 næmingar, og at játtanin verður meira viðbrekin, har talan verður um eitt lutfalsliga stórt lop í játtanini frá næmingi nr. 20 til 21 í hvørjum flokki, og at hetta eisini kann fáa tær avleiðingar, at tað verða fleiri tíðaravmarkaðar starvsfólkasetanir á fólkaskúlaøkinum.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at tað er rætt, sum Undirvísingarstýrið omanfyri vísir á, at talan verður um eitt lutfalsliga stórt lop í játtanini frá næmingi nr. 20 til 21,

at tað helst verða fleiri flokkar, og at tað kann fáa tær avleiðingar, at tað verða fleiri tíðaravmarkaðar setanir í fólkaskúlanum. Tað er tó sera umráðandi, at vit ikki hava ov stórar flokkar, og at næmingarnir fáa bestu hølis- og læriumstøður í skúlanum, og hetta er endamálið við hesi lógarbroyting.

Undirvísingarstýrið nevnir í sambandi við fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum, at í útrokningini í tilmælinum er ikki tikin hædd fyri samanlagdar flokkar við fleiri enn 20 næmingum í 1. til 6. flokkaðum skúlum, heldur ikki fyri lønarhækkingum síðan 2022 og fyri núverandi tvílæraraskipan, ið fellur burtur í 1. og 2. flokki við næmingi nr. 21. Somuleiðis metir Undirvísingarstýrið, at rætta orðingin av samlaðu útreiðslunum av uppskotinum eigur at verða 36 mió. kr. um árið, í staðin fyri sum í viðmerkinginum til uppskotið 36 mió. kr. tilsamans.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at uppskotið verður tillagað í samsvari við hesar viðmerkingar.

Undirvísingarstýrið vísir á, at henda eyka útreiðsla til lønir svarar til á leið 60-70 ársverk, og at eftirsum hesi ársverk ikki eru til í løtuni, eigur tað at verða umhugsað at taka fleiri læraralesandi inn á Setrið komandi árini.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at hetta fer at verða umrøtt í næstum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Sambært álitinum um broytingar í fólkaskúlanum fer hetta fyri landið at kosta umleið 2 mió. kr. í 2025 og 4 mió. kr. árliga tey næstu átta árini, og 2 mió. kr. í 2035, t.v.s. tilsamans umleið 36 mió. kr. árliga. Hesin kostnaður er roknaður í mun til væntaða økta talið á lærarum. Henda upphædd er roknað sum munur á pultstímum í verandi skipan á 10.850 pultstímar samanborið við pultstímar á 9.083, tá ið næmingatalið í flokkunum er 20 næmingar og býtt við 24 tímum, sum er miðal undirvísingartímatal hjá lærarum. Hetta er økta læraratalið, sum verður faldað við kostnaðinum fyri eitt ársverk, sum er kr. 500.000. Hetta gevur ein meirkostnað á umleið 4 mió. kr. árliga í níggju ár, og eftir 9 árum verður meirkostnaðurin góðar 36 mió. kr. árliga. Grundarlagið fyri útrokningunum er næmingatalið skúlaárið 2022-2023, og her er sostatt ikki talan um eina demografiskt fíggjarliga framskriving, og skal henda upphædd tí takast við fyrivarni. Broytist næmingartalið, sum nógv bendir á, at tað ger, so ávirkar hetta eisini kostnaðin tey komandi 9 árini. Ætlanin er at gera fleiri broytingar í fólkaskúlanum millum annað at stytta skúladagin, sum alt annað líka kemur at lækka rakstrarútreiðslurnar.

Fyri kommununrnar verða fíggjarligu avleiðingarnar av hesum uppskoti treytaðar av, hvørjar umbyggingar, útbyggingar og nýbyggingar, hvør einstøk kommuna má seta í verk til tess at útvega nøktandi hølisumstøður til at hava nokk av floksstovum til flokkar við 20 næmingum. Verður tað býtt í tveir flokkar í øllum núverandi flokkum við fleiri enn 20 næmingum, so økist flokkatalið við 75 flokkum tey komandi nýggju árini. Hetta kemur at kosta mest fyri tær stóru kommurnar við størri flokkum og størri skúlum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað verða ikki nógvar og umfatandi umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Fyri landið fær hetta tær avleiðingar, at tað verða fleiri skúlaflokkar, at tørvur verður á fleiri útbúnum lærarum og at játtað verða tímar til tveir flokkar við næmingi nr. 21.

Fyri kommunurnar verða avleiðingarnar, at tær mugu tillaga umbyggingar, útbyggingar og nýbyggingar av skúlum og skúlastovum í mun til økta tørvin á floksstovum, har flokkatalið tilsamans tey næstu nýggju árini í mesta lagi økist við 75 flokkum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur við sær størri avleiðingar fyri størru kommunurnar við høgum barnatali og tessvegna høgum næmingatali, tí í hesum kommunum verða fleiri flokkar við fleiri enn 20 næmingum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki ávirkan á millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki ávirkan á tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ongar skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Nei
Umhvørvislig ar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1

Greinin gevur heimild til skúlaleiðaran at velja ímillum antin at býta flokkin upp við 21. næminginum, ella seta inn við aðrari skipan, t.d. tvílæraraskipan, sum skal tryggja nøktandi undirvísingartíð til tann einstaka næmingin. Í mun til galdandi rætt, har næmingatalið við skúlaársbyrjan vanliga ikki eigur at fara upp um 24 í hvørjum flokki, kemur henda grein at hava tær broytingar við sær, at frameftir verður gjørt galdandi, at skúlaleiðarin kann býta flokkin upp í tveir flokkar, tá næmingatalið verður hægri enn 20 næmingar í hvørjum flokki.

Viðmerkjast skal, at tað neyðturviliga ikki skal vera talan um tvílæraraskipan, men at tað eisini kann hugsast, at skúlaleiðarin velur at seta inn á annan hátt, eitt nú við at seta ein námsfrøðing inn í flokkin til at arbeiða við trivnaði í flokkinum og at hava til uppgávu at venja næmingar í virkisháttum og arbeiðsháttum til tess at menna virkisførið hjá einstaka næminginum, umframt

at veita persónligan og praktiskan stuðul, sum kann hjálpa næminginum í sambandi við skúlagongdina.

Orsøkin til, at frælsið verður givið skúlaleiðaranum til at velja ímillum at býta flokkin upp ella seta aðra fyriskipan í verk, skal síggjast í ljósinum av, at tað ikki altíð er mest skynsamt at býta flokkin upp. Tá tað t.d. er talan um ein vælvirkandi flokk við 21-22 næmingum, tá kann tað í ávísum førum vera ein betri háttur at tryggja nøktandi tíð til tann einstaka næmingin, t.d. við tvílæraraskipan ella við at brúka námsfrøðiligan stuðul inni í flokkinum.

Greinin hevur við sær, at tað frameftir skulu vera tímar tøkir til tveir flokkar, tá næmingatalið við skúlaársbyrjan er meir enn 20, og tekur skúlaleiðarin so avgerð um, hvussu henda tímajáttan verður brúkt. Hvussu játtanarskipanin frameftir kemur at síggja út, er ikki avgjørt enn. Við hesum verður tryggjað meira læraratíð til einstaka næmingin umframt møguleiki fyri at skapa góðar relatiónir millum tann vaksna og næmingin, sum er av alstórum týdningi fyri læring og trivnað hjá næminginum og harvið eisini hjá flokkinum.

Viðmerkjast skal tó, at mett verður, at nýtt floksskifti og floksbýti eigur at verða gjørt við størsta fyrivarni, serliga tá ið næmingarnir hava funnið sítt tilhaldsstað, sínar vinir og floksfelagar í sínum samansjóðaða flokki. Hetta grundað á, at fleiri atlit mugu takast, nógv viðurskifti og nógvir faktorar kunnu gera seg galdandi, tá avgerð skal takast um floksskipan og floksbýti í einstaka skúlanum. Her eigur skúlaleiðarin at taka atlit at, hvussu trivnaðurin, huglagið og arbeiðslagið er í flokkinum. Er talan um ein flokk við fleiri enn 20 næmingum, har næmingarnir trívast sera væl, eru í rúkandi menning og har øgilig framgongd er í læruúrtøku næminganna, skal skúlaleiðarin vera varin, tá avgerð skal takast um at býta flokkin í tvey. Taka vit eitt dømi um ein flokk, har næmingatalið við skúlaársbyrjan er 21 næmingar, er tað ikki altíð neyðturviliga rættast at býta næmingarnar upp í tveir flokkar á 10 og 11 næmingar, tí tá kunnu flokkarnir møguliga gerast ov smáir við ov lítlum dynamikki, har næmingarnir møguliga hava færri møguleikar til at finna vinir og til at luttaka í ymiskum bólkum inni í flokkinum.

Tað er bert um næmingatalið er hægri enn 20 við skúlaársbyrjan, at skúlaleiðarin kann býta flokkin í tvey, t.v.s. er næmingatalið við skúlaársbyrjan 20 næmingar, har tað so seinni í skúlaárinum koma fleiri næmingar í flokkin, so kann skúlaleiðarin tað skúlaárið ikki býta flokkin í tvey. Men eru fleiri enn 20 næmingar í flokkinum við skúlaársbyrjan, so fær skúlaleiðarin játtan til tveir flokkar, og skúlaleiðarin kann tá velja at býta flokkin í tvey við skúlaársbyrjan ella seinni í skúlaárinum, og skúlaleiðarin kann taka sína avgerð við støði í, hvat er best gagnligt fyri flokkin og fyri skúlan sum heild.

Til § 2

Eingin viðmerking er til hesa grein.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 7. mars 2024

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl

1. Javntekstur
2. Hoyringarsvar frá Undirvísingarstýrinum
3. Hoyringarsvar frá Sernámi
4. Hoyringarsvar frá Námsvísindadeildini
5. Hoyringarsvar frá Føroya Lærarafelag
6. Hoyringarsvar frá Kommunufelagnum
7. Hoyringarsvar frá Foreldrafelagnum Heim og Skúli
8. Hoyringarsvar frá Heilsumálaráðnum
9. Hoyringarsvar frá Fíggjarmálaráðnum
10. Hoyringarsvar frá Umhvørvismálaráðnum
11. Hoyringarsvar frá Almanna- og mentamálaráðmum